# Fimleikakapping hjá Havnar Fimleikafelag





FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Havnar Fimleikafelag hevði sunnudagin 27. januar stóra innanhýsis kapping fyri einstaklingar í amboðsfimleiki. Kappingin var fyri gentur og dreingir 8 ár og eldri.

Kappast varð í venjingum á gólvi og lopi. Tilsamans vóru 95 luttakarar, 67 gentur og 28 dreingir.

Tveir fimleikarar skaraðu framúr, tá talt varð saman í bólku 1,2 og 3 eftir kappingina. Tey vóru Maria Poulsen við 16,75 stigum og Jóni Brandsson Christiansen við 16,05 stigum. Hesi fingu steyp til ognar.

Hetta er aðru ferð, at Havnar Fimleikafelag skipar fyri slíkari innanhýsis kapping, og luttøkan var nærum tvífaldað hesuferð.

# Týr tók Keypmannahavn við stormi

**Føroyski rockbólkurin Týr vann stóru donsku tónleikakappingina Melody Maker. Finalan varð hildin í Keypmannahavn fríggjakvøldið, og eingin ivi var millum dómarar og áhoyrarar um, hvør besti bólkurin var**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



Tað var ikki bara í Føroyum, at ódn var fríggjakvøldið. Eisini í Keypmannahavn leikaði ein føroysk ódn í.

Rockbólkurin Týr gjørdi bart, tá finalan í donsku tónleikakappingini Melody Maker varð hildin í Keypmannhavn hetta kvøldið. Týr var kosin besti bólkurin í kappingini, og eisini áhoyrararnir valdu Týr til besta bólkin hetta kvøldið.

Melody Maker Contest er ein opin kapping fyri tónleikabólkar, sum eru á veg fram, og donsk plátufeløg halda eygu við kappingini. Fleiri innleiðandi umfør eru, og síðani er ein stór finala.

Finalan í 2002 var í Pumpehuset í Keypmannahavn fríggjakvøldið. Útselt var til tiltakið, og nógvir føroyingar vóru eisini millum áhoyrararnar. Týr var saman við átta øðrum donskum bólkum komin í finaluna.

Eitt serligt dómarapanel var sett saman til at velja ársins bólk, sangara og sang. Í hesum paneli vóru Lau Wulfsberg frá Nordic Records, Henrik Bøwadt frá Sony Music, tónleikararnir Tim Christensen og Marcus Winterberg, Nikolaj Lubic frá blaðnum Gaffa og Sasha Dupont, sum er annar av klaverspælarunum í sendirøðini Gita ein sang.

Hesi fólk hildu, at Týr var besti bólkurin hetta kvøldið.

- Vinnararnir vóru okkara føroysku brøður í Týr, sum spældu sum ein væl samansjóðað eind, og tú merkti greitt teirra norðurlendsku røtur. Serliga tá teir spældu sangin How far to Asgaard mundi lítil ivi vera um, at tey livdu við í Valhøll, verður skrivað á heimasíðuni hjá Melody Maker

Týr spældi tríggjar sangir í finaluni. Teir løgdu fyri við Sand in the Wind, síðani var tað Ormurin Langi, og teir endaðu framførsluna við How far to Asgaard, sum er heitislagið á fløguni hjá teimum, sum júst er komin út.

Umframt besta bólk, valdu dómararnir eisin besta sangara og besta sang. Besti sangari gjørdist Jesper Bruun Johansen úr bólkinum Turbulence, og besta sangin hevði bólkurin Wish skrivað. Harafturat sloppu áhoyrararnir eisini at velja sín bólk, og tað var eingin ivi um, at teimum dámdu best Týr.

- Tá sangarin í Týr, Pól Arni, so kom á pallin og treiv í eitt føroyskt kvæði, vórðu áhoyrarnir frá sær sjálvum og tóku saman ring á gólvinum, skrivar heimasíðan hjá Melody Maker.

Vinningarnir í kappingini vóru peningaupphæddir millum 5 og 10.000 og kjansurin at spæla á stórari rockkonsert á Femøren á høvuðsstaðarleiðini í summar.

Vit rokna við at frætta meira frá Týr um, hvat sigurin í kappingini merkir fyri teir.



UPPRUDDINGARTILBOÐ!
Spar upp til 50%
Ymsar útgingnar og skaddar vørur t.d.

ASKO W600 Vaskimaskina
• 1000 snún./ min.
• elektr. stýring
SPAR 31%
Vanl. prísur 9.550,- TILBOÐ 6.500,-

Teba TFB14Y Komfýrur
• vanl. plátur
• yvir- og undirhita/grill
SPAR 17%
Vanl. prísur 3.325,- TILBOÐ 2.750,-

Creda 37635 Turkitrumla
• avtrekk
• mekanisk timara
SPAR 32%
Vanl. prísur 3.095,- TILBOÐ 2.100,-

Gram KS400-04G Køli-/ svaliskáp
• køl 237 ltr./ sval 140 ltr.
• h 174,2/ b 59,5 cm
SPAR 50%
Vanl. prísur 6.325,- TILBOÐ 3.165,-

| Gram | Frigor | smeg | ASKO | VOSS | Gram |
|---|---|---|---|---|---|
| KS240-06G | TL450 | SE210 | T760 silver | ELK2000-1 | KS2300 |
| Køliskáp | Frystiboks | Innb. ovnur | Turkitrumla | Komfýrur | Køliskáp |
| Vanl. prísur 4.895,- | Vanl. prísur 4.495,- | Vanl. prísur 7.615,- | Vanl. prísur 8.795,- | Vanl. prísur 15.295,- | Vanl. prísur 9.330,- |
| TILBOÐ 3.000,- | TILBOÐ 3.700,- | TILBOÐ 4.800,- | TILBOÐ 6.800,- | TILBOÐ 12.000,- | TILBOÐ 6.000,- |

Og nógv onnur tilboð uppá ymiskar hvítvørur!
Bæði í hvítum og stáli og í fleiri ymsum støddum!
Avmarkað nøgd!!!

24 MÐR. GARANTI - DØGNTÆNASTA HANDILIN ÓKEYPIS ÚTKOYRING OG ÍBINDING

Fyrimunir við at keypa hvítvørur frá LM-Handlinum:
• Kappingarførir prísir
• LM-handilin hevur sína egnu tænastudeild, ið er virkin 24 tímar um samdøgrið
• LM-handilin veitir 2 ára garanti
• LM-handilin veitir og setur til hvítvørur og burturbeinir tær gomlu - ókeypis*
• LM-handilin hevur verið førandi á økinum í meira enn 65 ár
• LM-handilin hevur útbúgvið starvsfólk, ið altíð veitir bestu tænastu.

* Treytað av at landfast er, har koyrt verður til

Allir prísir eru kontant-prísir !

HANDILIN
LM-Handilin · Smyrilsvegur 2 · Tel 31 12 20 · Boks 3100

Eysturoyar Røktar- og ellisheim
620 Runavík

Søkir:
Fysioterapeut – 0,8 tíð – at byrja 01.03.02. – ella eftir nærri avtalu.

Løn- og setunartreytir:
Sambært galdandi sáttmála.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Fanny Kruse, fysioterapeuti á tlf. 448201.

Umsókn, saman við avriti av prógvi v.m. skal sendast heiminum innan 20.02.02.

Dynamo Stol ApS
Postboks 162
DK- 4000 Roskilde
Tlf: (+45) 46 75 09 70
Fax: (+45) 46 75 09 50
e-mail: kontakt@dynamo-stol.dk

Dynamo® Stol Aps

Styrk din ryg med en Dynamo Stol

PAS PÅ DIN RYG!

Besøg vores hjemmeside: www.dynamo-stol.dk



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo